# Borgarstjóri á odda í Gay Parade



Borgarstjórikn, Jón Gnarr, hevði fingið heiðurspláss í paraduni. Hóast hann er íklæddur drag, er hann ikki samkyndur

**GAY PARADE** **Nývaldi borgarstjórin í Reykjavík, Jón Gnarr, hevði heiðursplássið, tá árliga Gay Parade varð hildin í Reykjavík við umleið túsund í paraduni og eini 8-10.000 marsjerandi við ella hugdu at**

Leo Poulsen

Nýggja rákið er, at tey samkyndu savnast saman til paradur runt um í heiminum, og eitt av støðunum er Reykjavík.

Leygardagin var so 10. Gay Parade hildin í íslandska høvuðsstaðnum, og sigast má, at undirtøkan var góð.

Fyri trimum mánaðum síðani ella so varð stand-up komikarin, Jón Gnarr, valdur til borgarstjóra í Reykjavík, og ikki kann sigast annað enn, at hann skilir seg burtur frá øðrum politikarum. Hann setti stevnuna hósdagin klæddur í drag. Og hann hevði eisini fingið hiðursplássið í sjálvari paraduni leygardagin.

Aftan á tveimum politi motorsúklum fylgdu níggju »dykes on bikes« (dykes er slang fyri samkyntar kvinnur), fylgdar av hornblástri og flaggberarum, og síðani fyrstur í sjálvari paraduni kom borgarstjórin – eisini hesaferð klæddur í drag.

So smeyg sær kilometur langa paradan framvið akkompanierað av tónleiki av alskyns slag. Allir teir 10-12 lastbilarnir høvdu sín egna tónleik og sítt egna tema við samkyndum kvinnum og monnum, ungum sum gomlum. Og í halanum koyrdi ein trailari við einum rundum, reyðum palli, sum hydrauliskt trýstur upp og loraður niður, og á toppinum – somuleiðis í reyðum – stóð íslendski luttakarin í europeiska Grand Prix, Páll Oskar, ið sjálvur er samkyndur, og framførdi nakrar sangir.

## Rivin við

Tað sá tó einki serligt út bert ein tíma undan paraduni. Tað regnaði, og útlitini vóru í heila tikið ikki tey bestu.

»Rain on my parade« er kent hugtak í Amerika og verður sagt, tá onkur vil tillítisgera onkra gerð hjá onkrum øðrum.

Og tað sá veruliga út til, at veðurgudarnir ætlaðu at »rain on« Gay Parade. Men stutt fyri klokkan 14, tá paradan skuldi byrja, sleit í, og sólin hevði stundum hug at kaga fram.

Vit høvdu stilla okkum strategiskt við niðara enda á gongugøtuni Laugavegi, og tað var leingi at bíða. Helst hevur fráferðin verið seinkað, og vit bíðaðu trý korter, áðrenn paradan endiliga náddi fram.

Men tolin trívst, og ein sjáldan upplívgandi stemningur var, tá paradan spakuliga fleyt framvið. Onkur í ferðalagnum vildi enntá vera við, at hann fekk bæði gásahold og tár í eyguni, og tað kann so vera tað, men ein heilt serligur stemningur var, og fleiri klappaðu og veittraðu at luttakarunum í paraduni.

Men hóast hetta var ein Gay Parade, var einki ósømiligt at síggja – uttan so, at ein nakin ungur maður, einans íklæddur elefantaundirbuksir er ósømiligt. Stemningurin og paraduluttakararnir mintu mest um víðagitna karnevalið í Rio.

Tað tók samlaðu paraduni minst 45 minuttir at flóta fram við okkum, so nógvir luttakarar vóru – eini túsund í tali.

## Ójøvn á máli

Tað er einki at ivast í, at valið av stand-up komikaranum, Jón Gnarr, er ein fullkomin uppgerð við fortíðina, og minnir ikki sørt um, tá Jacob Haugaard carð valdur í danska Fólkatingið.

Jón Gnarr er eisini ein ógvuliga kontroversiellur borgarstjóri, tí rinki er at ivast í, at hann er ógvuliga væl umtóktur – annars varð hann jú ikki valdur – men tað er heldur einki at taka seg aftur í, at ikki allir reykjavíkbúgvar eru líka fegnir um at síggja fremsta politiska persónir ganga runt íklæddur kvinnuklæðir.

Tað er ikki virðiligt fyri ein so týðandi politiskan post, vildi summi verða við.

Men »hvorom alting er«, so er Gay Parade komin fyri at vera, og tað eru nógvir íslendingar, ið eru ernir av, at Reykjavík er vertur fyri einum slíkum tiltaki. Tað er jú heldur ikki júst nøkur loyna, at íslendski forsetin er samkynd.

So meðan luttakaratalið í sjálvari oparauni – írokna hinkyndar dansarar – lá um eini túsund, vóru fylgjufólk og áskoðarar millum 60.000 og 70.000 í tali. Og tað er immervekk nógv í einum býi við 140.000 íbúgvarum.

leo@sosialurin.fo





Fleiri av dansarunum eru hinkyndir, men vilja partvís stuðla og partvís vísa seg fram



Eitt av tema'unum í paraduni var Chicago í 30'unum